


Smyril Line varð stovnað í 1982, og í dag selja og marknaðarføra vit Føroyar, Ísland, Noreg, Hetland og Danmark um allan heimin.

Høvuðsskrivstova felagsins er í Tórshavn. Eisini hevur Smyril Line skrivstovur í Hanstholm, Bergen, Reykjavík, Kiel og í Lerwick. Agentar eru í Svøríki, Finnlandi, Týsklandi, Eysturríki, Sveits, Benelux, Fraklandi og Italia.

# ROKNSKAPARSTARVSFÓLK TIL SMYRIL LINE

## Søkt verður eftir roknskaparstarvsfólki til Norrönu. Starvið skal setast skjótast gjørligt.

Vit sóknast eftir sjálvstøðugum og smidliga sinnaðum starvsfólki til mennandi og fjølbroytt arbeiði til Norrönu – ferðamannaskip okkara. Sum starvsfólk á sjónum í Smyril Line verður tú partur av eini áhugaverdari mentan í eini altjóða fyritøku. M/F Norröna er skip, ið tekur 1.482 ferðandi og 800 bilar. Tann partin av árinum, tá ið sum mest er at gera, telur manningin 118 fólk úr fleiri ymsum londum.

**Ábyrgdarøki**

- at hava um hendi umsetningin umborð bæði roknskaparliga og fíggjarliga
- at menna, halda og dagføra frágreiðsluamboð
- at vera við til at gera árs-, ársfjórðingsroknskapir og fíggjarætlanir
- at vera við til at menna tilgongdir og bøta um tær við KT-nýtslu
- at umsita manningina umborð og hava umsóknir og mynstringar um hendi
- at flyta lønir og taka sær av ymsum bókhaldsuppgávum sum bókingum og avstemman
- at verða við í verkætlanum, sum taka seg upp so hvørt

**Yrkiseyðkenni, vit sóknast eftir**

- Hevur kunnleika til MS-Office pakkan og dugir framúr væl at brúka Excel
- Dugir væl at samskifta bæði skrivliga og munnliga
- Hevur royndir frá arbeiði, ið líkist hesum.
- Hevur gott innlit í fíggjarviðurskifti og dygga ástøðiliga barlast við dagførdari vitan
- Dugir norðurlendskt og klárar teg bæði í skrivligum og munnligum enskum

**Persónseyðkenni, vit sóknast eftir**

Tú dugir væl at arbeiða skipað og miðvíst, ert nærlagdur og vandin og megnar at varðveita tamarhaldið, sjálvt tá ið arbeiðið leggur stórt trýst á teg. Tú trívist í gerandisdegum við fjølbroyttum og ymisligum arbeiðsuppgávum og dugir at laga teg eftir nýggjum støðum við røttum sinni og huga. Tú skilir krøv til tænastur, ert tilvitandi um dygd og eigur evnini at greina mál sundur. Tað fellur tær lætt at samskifta á øllum stigum, tú hevur ans fyri teimum støðum, tú ert í, og tær dámar óformligt prátingarlag. Umframt er tað tær til fyrimunar, at tú hevur góð leiðaraevni

Hevur tú spurningar starvinum viðvíkjandi, ger so væl og set teg í samband við Financial Controller Janne Kolbo gjøgnum teldupost controller@norrona.fo ella á telefon +298 34 49 92

Ger so væl og stíla umsókn tína og títt CV, merkt "Controller", til crew@smyril-line.fo

Starvið verður sett skjótast til ber, men vit bíða fegin eftir tí rætta.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM




# SKRIVSTOVUFÓLK

## til koyrikortdeildina

Søkt verður eftir skrivstovufólki til koyrikortdeildina at seta beinanvegin. Talan er um eitt fast starv, ið er skipað sum fulltíðarstarv.

**UPPGÁVAN**

Uppgávan fevnir m.a. um:

- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Skráseting og framleiðslu av koyrikortum
- Umsiting av tíðum til ástøðis- og koyriroyndir
- Málsviðgerð
- Postavgreiðslu
- Kassauppgerð

**FØRLEIKAKRØV**

Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og royndum við arbeiði á skrivstovu. Dentur verður lagdur á, at ein hevur góð samstarvsevni og er fyrikomandi. Tað er ein treyt, at ein hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

**SETANARTREYTIR**

Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Tórunn S. Miðberg, deildarleiðara, á telefon 35 04 18.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi áðrenn 30. apríl 2007. Vinarliga merkið brævbjálvan »koyrikortdeildin.«

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

REPROZ

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo




# SKRIVSTOVUFÓLK

## til avgreiðsluna

Søkt verður eftir skrivstovufólki til avgreiðsluna at byrja skjótast gjørligt. Talan er um parttíðarstarv seinnapart á degi hvønn dag.

**UPPGÁVAN**

Uppgávan fevnir m.a. um:

- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Skráseting av akførum
- Avgreiðslu av skrásetingargjøldum
- Kassauppgerð
- Aðrar fyrifallandi uppgávur

**FØRLEIKAKRØV**

Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á, at ein hevur góð samstarvsevni og er fyrikomandi. Tað er ein treyt, at ein hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

**SETANARTREYTIR**

Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Hans Jacob Stenberg, deildarleiðara, á telefon 35 04 08. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi áðrenn 30. apríl 2007. Vinarliga merkið brævbjálvan »avgreiðslan.«

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

REPROZ

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo